Fornir bendingarformar av kenniorðinum og lýsingarorðum í hvørjumfalli, varðveittir í Norðuroyamáli

Eftir Ulf Zachariasen.

I.

Endamálið við hesum reglum er fyrst og fremst at gera vart við nøkur formlig fyribrigdi í málinum í Norðuroyggjunum, eina helst í eystasta partinum av teimum. Hesi fyribrigdi eru, tað høvundurin veit, ikki viðgjørd nakrastaðni.

Eyðkenni hjá hesum fyribrigdum er ein tillíking av kallkyns- og hvørkikynskenniorðinum í hvørjumfalli í eintali, í føroyskum vanliga *-(i)num* (bátinum, skipinum o. til.), til hitt samsvarandi kvennkynskenniorðið *-(i)ni* (búðini, konuni o. o.); harumframt verður nevnt, at veikt bend lýsingarorð í Fugloyarmáli hava varðveitt hitt forna *-um* í hvørjumfalli í fleirtali (t. d. hjá teimum gomlum), hetta kundi verið grundin til, at veikir formar av lýsingarorðum í fleirtali annars javnan verða ávirkaðir av teimum samsvarandi sterku (t. d. nú hinir gamlir el. gomlir).

Sagt skal verða beinan vegin, at høvundurin enn ikki hevur haft umstøður at ferðast nóg víða um norðanfyri at kanna útbreiðsluna hjá hesum fyribrigdum út í æsir ella at vita, um okkurt serligt frávik frá teimum kundi funnist í onkrari bygd har norðuri. Kortini verður tað hildið beinast, at fyribrigdini longu nú verða drigin fram í ljósmála og fyribils viðgjørd. Um komandi rannsóknir fara at styðja ella broyta tað, sum

her verður sagt, ella um okkurt verður at leggja afturat, verða rannsóknarúrslitini løgd fram seinni.

II.

Hin vanliga mannagongdin í føroyskum viðvíkjandi hvørjumfalli í eintali í hvørkikyni av upprunaligari fornavnabending er tann, at hin forna endingin *-u* dvínur fyri kallkynsforminum *-um* (nú framborin [--n]). Slíkar formar við *-um* í hvørjumfalli í eintali í hvørkikyni, ið komið er fyri *-u* í fornmálinum, finna vit í talorðinum ein, í fornøvnunum, tá undantikin eru persónsfornøvnini og ávísingarfornavnið tann, í kenniorðinum og í sterkt bendum lýsingarorðum og sagnorðum í 2. lýsingarhátti í sterkt bendum formi. Dømi: úr einum plássi; av mínum kyni, úr tínum húsi, í sínum lagi, á hesum sinni, úr hasum plássinum, úr hvørjum holi, í hvørgum føri(num), í ongum føri o. s. fr.; skipinum, nesinum, húsinum, landinum, fjallinum; í góðum lag, í stolnum koti o. s. fr.

Júst hví kallkyn her hevur vunnið á hvørkikyni, og hvussu hesin vøkstur annars hevur tikið seg upp, kann ikki verða sagt avgjørt, men tað kann bert hava styðjað gongdina, at veikt bend lýsingarorð og sagnorð í 2. lýsingarhátti í veikt bendum formi frammanundan hava somu hvørjumfalsending í kallkyni og hvørkikyni: tí góð*a* manninum, tí góð*a* húsinum, tí best*a* bátinum, tí best*a* skipinum, tí farn*a* bátinum, tí farn*a* skipinum o. s. fr., og kanska hevur tað eisini hjálpt til, at *-i* í hvørjumfalli í eintali av navnorðum í óbundnum formi í nýføroyskum er vanligt bæði í kallkyni og hvørkikyni: manni, báti, flúri, hesti, skipi, húsi, nesi o. s. fr. (*-i* er tó ikki so vanligt í sambandi við navnorð, sum í nýføroyskum enda við sjálvljóði, men eisini her standa kallkyn og hvørkikyn mestsum á jøvnum: í Bø, úr træ, í góðum lag; degnum, bønum, lagnum o. s. fr.). Annars er at vísa til hitt vanliga rákið í føroyskum málvøkstri móti einfaldan og útjavning í formaskipanini, har sum dømi kunnu verða nevnd: eingin munur er longur á óbundnum formi av kallkyns-navnorðum í hvørfalli og hvønnfalli fleirtali (hestar, vinir, firðir, úlvar, grannar o. s. fr.); *-r* úr hvørfalli fleirtali

hevur otað seg inn í hvønnfall í fleirtali av talorðinum ein og av flestu fornøvnunum, av kenniorðinum og av sterkt bendum lýsingarorðum í 2. lýsingarhátti í sterkt bendum formi: einar vøttir, nakrar bátar, ongar menn; firðirnar, hestarnar, vinirnar, úlvarnar; stórar vagnar, raskar menn, skjótar bátar, brotnar rútar o. s. fr.; fleirtal av persónsfornøvnunum má víkja fyri tvítali; 1. og 2. persónur í fleirtali av sagnorðum mugu víkja fyri 3. persóni (vit, tit, teir fara); formar við *-ei-* í eintali í tátíð av fyrsta flokki av sterkt bendum sagnorðum mugu mangan dvína fyri *-ey-* úr øðrum flokki (beyt, sleyt, greyn o. o. fyri beit, sleit, grein), sbr. norskt, KOLSRUD 1951. Og soleiðis kundi verið hildið á eina góða løtu enn.

Hinumegin hava vit í føroyskum skilligt lyndi til ljóðliga útgreining í herðingarsterkari staving, so heildarmyndin av málinum til innihald (formaskipan) og yvirbragd (ljóðviðurskifti) alsamt er ógvuliga fjølbroytt.

Ein hjálp hevði tað verið til lýsing av áðurnevnda lyndi í føroyskum til einfaldan og útlíkning av innihaldinum, um vit úr seinna parti av miðøldini og fyrstu øldunum aftan á trúbótina høvdu haft fleiri skrivligar keldur, sum kundu sýnt okkum gjøllari, hvussu alt hetta hevur tikið seg upp. So kundu vit eisini sað við vissu, um áðurnevnda tillíking av kallkyni og hvørkikyni viðvíkjandi nýtslu av *-i* í hvørjumfalli kann hava styðjað framvøksturin av *-m* í (upprunaligum) fornavnaformum í hvørkikyni í eintali, ella um tillíkingin møguliga er seinni í tíðini.

III.

Fleiri skrivligar keldur úr eldri tíð høvdu eisini gjølligari kunnað sagt okkum nakað um tillíkingina *-i(c)* og *-u(c)*[1]) í herðingarveikari staving. Henda tillíking hevur møguliga haft týdning fyri eitt forvitnisligt frábrigdi frá nevnda vøkstri í føroyskum annars, at *-u* í (upprunaligari) fornavnabending í hvørjumfalli í eintali í hvørkikyni verður *-um*.

---

[1]) c merkir hjáljóð (consonans).

Hetta frábrigdið, sum høvundurin hevur hoyrt í Fugloynni, í Svínoy og í Kunoy, vísir seg við, at einki [-n] kemur afturat kenniorðinum í hvørkikyni eintali, og tað er eisini vanligt, at fornt *-m* hvørvur úr kenniorðinum í kallkyni í eintali. *-i(c)* og *-u(c)* í herðingarveikari staving eru har norðuri runnin saman í *i(c)*, framborið [*ı*(c)], tað vil siga at vit har norðuri finna sama form av kenniorðinum í eintali í kallkyni, kvennkyni og hvørkikyni: [(*ı*)n*ı*]. Dømi, sum fyri fyrst kunnu verða skrivað soleiðis: bátinu, postinu, bønu; konuni, fjølini, kúnni (í slíkum føri verður *n* framborið langt); skipinu, húsinu, krígnu o. s. fr.

Skriftformarnir, soleiðis sum teir her eru skotnir upp, bera boð um, hvussu høvundurin heldur, at hetta frábrigdið av kenniorðinum í hvørjumfalli í eintali skal verða greitt. At hugsa sær, at kvennkynsformurin, áðrenn herðingarveik *-i(c)* og *-u(c)* eru runnin saman (hetta kann væl vera serliga gamalt har norðuri), skuldi kunnað vunnið á bæði kallkyns- og hvørkikynsformunum, sum hann annars í aðrar mátar skilur seg frá (tí góð*a* manninum — tí góð*u* konuni — tí góð*a* barninum), tykir lítið trúligt, serstakliga ikki um vit hugsa okkum eitt, nú horvið, millumbil í málinum har norðuri, tá kallkynsformurin, *-um*, hevur otað seg inn í hvørkikyn, tí um so hevði verið, høvdu kallkyn og hvørkikyn skipað mestsum eina samgongu, sum í tali og nýtslu hevði verið væl sterkari enn kvennkyn.

Nógv líkari tykir at hugsa sær, at tað eru kvennkynsformurin, *-(i)nni* og hvørkikynsformurin, *-(i)nu*,ið renna saman, í sambandi við tillíkingina av herðingarveikum *-i(c)* og *-u(c)* og styttingina av herðingarveikum *-nn-* (henda stytting stavar frá ljóðalongdarkollveltingini í føroyskum). Á henda hátt gera kvennkyn og hvørkikyn eina samgongu, sum ikki nervar formaskipanina annars (tí góð*u* konuni — tí góð*a* skipinu), og henda samskipan verður so sterk í tali og nýtslu, at hon hevur lyndi til at ota seg inn í kallkyn við.

Ein annar møguleiki, sum eigur at verða nevndur, men sum færri líkindi eru til, er, at í Norðuroyamáli kann hvørkikyns-*(i)nu* hava vunnið á kallkyns-*(i)num* uttan ávirkan frá kvennkyns-*(i)nni* ella *-(i)ni*. Við tað at hvørkikynskenniorðið í ein-

tali til tal og nýtslu tykist at hava veikari støðu í føroyskum enn kallkynskenniorðið, er minni ið bendir á henda møguleika. Soleiðis sum vandamálið er greitt har norðuri, hevur tað eisini tann fyrimun, at eingin ivi er, um eitt kallkyns- ella hvørkikynsnavnorð, sum stendur sær, er í eintali ella fleirtali: hestinu — hestunum, skipinu — skipunum t. d., tað kann ofta vera torført í føroyskum annars, av tí at sjálvljóðini *-u-* og *-i-* í næstseinastu staving (penultimastavingini) vegna viknanina *u>i* fáa sama ljóð, ella líka so ofta hvørva heilt til frama fyri stavingarberandi *-n-*.

IV.

Uttan fyri kenniorðið hevur høvundurin ikki verið varur við nakað frávik í talaðum Norðoyamáli frá føroyskum annars í eintali av (upprunaligari) fornavnabending. Tað eitur her, eins og í føroyskum vanliga, einum góðum báti el. skipi, í góðum lag, hann kom aftur við ongum o. s. fr. Tørvur á sundurgreining millum eintal og fleirtal hevur í hesum førum ikki verið tann sami sum í nýtsluni av kenniorðinum, við tað at møguleikarnir fyri samanblanding av eintals- og fleirtalsformum ikki hava verið so stórir her sum hjá navnorðum við kenniorði afturat, og serstakliga er at nevna, at møguleikin fyri samanrenning millum kvennkyn og hvørkikyn ikki hevur verið tann sami, all tann tíð kvennkyn her brýtur meira frá hvørkikyni (og kallkyni) enn í kenniorðinum við vanliga at hava fingið endingina *-ari:* einari góðari gentu, í hvørjari kroysu o. s. fr.

Tað eigur tó at verða nevnt, at í uppskrift av søgnini um Páll fanga, til skjals á Kongliga bókasavninum í Keypmannahavn millum pappír hjá Hans Berlin Kaarsberg, ið var prestur í Norðuroyggjunum í miðjuni av 1800-talinum (NKS. 1814 fol.), stendur í ørindinum um Hanus í Gerðum:

Hennes vi suinne rotna Leari,
han fik ait Skjin eav qvörjun Peari.

Uppskriftin sýnir, at hvørjumfalsformar í hvørkikyni í eintali av (upprunaligari) fornavnabending, ið bróta frá føroyskum annars, hava verið til eisini uttan fyri kenniorðið í nýggjari máli: *suinne,* fornt *sínu,* nýføroyskt *sínum.*

V.

Eitt annað frávik í Norðuroyamáli frá føroyskum annars skal verða nevnt her. Høvundurin veit seg ikki við vissu hava hoyrt tað aðrastaðni enn í Fugloyarmáli. Frávikið er í hvørjumfalli fleirtali í hini veiku (bundnu) bendingini av lýsingarorðunum. Fornmálið hevði her endingina *-um*, nýføroyskt hevur her *-u*, t. e. at veikt bend lýsingarorð hava sama form í fleirtali, hvørjumfall brýtur ikki frá hvørfalli ella hvønnfalli: teir gomlu menninir, teir gomlu menninar, teimum gomlu monnunum; tær føroysku genturnar (hvørfall og hvønnfall), teimum føroysku gentunum; tey stóru skipini (hvørfall og hvønnfall), teimum stóru skipunum o. s. fr. Eitt undantak er tó formurin *fleirum*, sum av og á hoyrist: hann var inni hjá fleirum o. til. Men Fugloyarmál brýtur her frá føroyskum annars við at hava varðveitt hvørjumfals-*um:* eg havi verið yviri hjá teimum gomlum, hann er í teimum nýggjum klæðunum, hann er av størstum monnum, hann var uppi í teimum bestum at fiska o. s. fr.

Føroyskt krevur við øðrum orðum vanliga greiniligan mun á sterkum og veikum formi av lýsingarorðum, og har fornmálið hevði sama form í báðum bendingum, nevniliga í hvørjumfalli í fleirtali, hevur føroyskt tikið hetta samanfall hjá sterkum og veikum formum av við at sleppa *-m* í veikari bending. Men Fugloyarmál hevur her gingið sínar egnu leiðir, tað hevur hildið fornari bending av lýsingarorðum í veikum formi í fleirtali uppi, og tað samanfall hjá sterkum og veikum lýsingarorðum í hvørjumfalli í fleirtali, sum stendur við har norðuri, kann í sinum lagi føra við sær eina ávísa fimlan í veikari bending av lýsingarorðum í fleirtali annars. Henda fimlan er til fyrst og fremst í hvørfalli í kallkyni og vísir seg í nýtslu av sterkum formum ella formum, ávirkaðum av teimum sterku, har føroyskt annars reglurætt hevur veikar formar: har fara teir høgir, nú hinir gamlir el. gomlir.

BÓKMENTIR

Sigurd Kolsrud: Nynorsken i sine målføre. Oslo 1951, s. 94 (Vestfold), 98 (Nedenes) og 114 (Trondheim).

SUMMARY

Attention is drawn to an aberration in the dialect of Norðuroyar, an archipelago among the Faroes, from the usual Faroese definite article in dative singular. Faroese has usually coincidence of neutre with masculine, *-(i)num,* while the dialect in some of the settlements on Norðuroyar carries out the feminine form, *-(i)ni,* in all genders. It is the authors opinion, that it is an early coincidence of fem. *-(i)nni* with neutr. *-(i)nu,* arisen through a weakening of the unstressed vowel *-u* for the benefit of *-i,* which is the presupposition of this particular development, in that fem. and neutre have formed a block with the ending *-(i)ni,* who has pushed into the masculine.

It is also brought into notice, that the original dative-form of weakly inflected adjectives in the plural, *-um,* which in Faroese usually is superseded by *-u* from the other cases, has been preserved in the dialect of Fugloy, the eastermost of the six Norðuroyar.